## Parken hevur tað fínt

Flemming Østergaard, nevndarformaður í Parken Sport & Entertainment og FCK, avsannar søgurnar í Berlingske um, at felagið skal vera í fíggjarligum trupulleikum. – Eg skal viðurkenna, at fíggjarkreppan hevur órógvað okkum eitt sindur, og hetta hevur viðført, at fíggjarútreiðslur okkara eru størri enn ætlað. Hetta er tó nakað, sum vit hava tosað við fíggjarstovnar okkara um, og eg eri sannførdur um, at vit eisini hava neyðuga gjaldførið komandi árini, sigur Østergaard við Ekstra-Bladet.



## Arabi vil keypa Chelsea

Enskir miðlar skriva nú, at arabiski Dr. Sulaiman al-Fahim hevur í kvittanini at keypa Chelsea. Alment hevur ríkmaðurin sagt, at hann hyggur at fleiri europiskum fótbóltsfeløgum, og at Chelsea er eitt av hesum. – Tað er ikki greitt, um Chelsea er til sølu, men eg rokni við, at alt hevur sín prís, sigur al-Fahim. Hvussu er og ikki, so verður talan neyvan um bíligan handil. Roman Abramovich hevur higar til nýtt einar fimm milliardir krónur upp á Chelsea, og hann selur neyvan felagið fyri minni enn hesa upphædd.

# FM-finalan upp á spæl

**Tað líkist einum sonnum braki, tá Tjaldur tekur móti VB sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Ongan tíð áður hevur ítróttarhøllin í Runavík verið karmur um eitt hondbóltbrak av tí slagnum, sum stendur á skránni sunnudagin*

Sum stigatalvan í Sunset-deildini sær út, er eingin ivi. Vinnur VB dystin í Runavík sunnudagin, er liðið í FM-finaluni. Øðrvísi kann niðurstøðan illa vera, og tí er av sonnum lagt upp til eitt brak, sum høllin í Runavík neyvan hevur verið karmur um fyrr.

Tjaldur hevur veruliga bitið frá sær í landskappingini í ár, og við einum sigri standa tær á gáttini til eitt finalupláss. Í øllum førum somikið nær, at tær sjálvar standa við avgerðini, um hetta skal gerast veruleiki ella ikki.

VB hevur hinvegin møguleikan at sópa allan iva til viks. Fyri ikki so nógvum umførum síðani líktist VB einum rættiliga tryggum finaluluttakara, men eitt stórtap í Runavík og eitt tepurt ditto í Klaksvík hava vikað hesa støðuna, og tí eru tær nú undir einum ávísum trýsti. Einum trýsti, sum tó ikki er størri enn so, at tær framvegis eiga allar møguleikar at avgera lagnu sína sjálvar.

### Greiðir favorittar

Í hinum báðum dystunum er talan um so heilt hampuliga greiðar favorittar.

Kyndil og Neistin spæla grannauppgerð á Hálsi, og her man lítil ivi vera um, at Neistin er sterkara liðið. Og hóast tær bláu nú eru endaðar í einum slag av ongamannalandi, so eru møguleikarnir fyri at røkka longur upp, um onnur kiksa á leiðini.

Og í Klaksvík er Stjørnan favorittur, mest sum hvørja ferð tær spæla. Og hóast StÍF fleiri ferðir hevur argað Stjørnuna, so er styrkismunurin helst somikið greiður, at strandakvinnurnar neyvan megna at gera tað heilt stóra við Stjørnuna.

### Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 25.01 | 14.30 | Kyndil-Neistin |
| 25.01 | 15.00 | Tjaldur-VB |
| 25.01 | 15.00 | Stjørnan-StÍF |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 25.01 | 16.00 | Kyndil-Neistin |
| 25.01 | 16.00 | VÍF-StÍF |
| 25.01 | 16.00 | KÍF-H71 |

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 24.01 | 13.00 | Fleyr-TB |
| 24.01 | 14.00 | ÍF-Dráttur |
| 24.01 | 15.00 | KÍF-SÍ |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 24.01 | 16.00 | Fleyr-SÍ |
| 25.01 | 15.00 | Mjølnir-ÍF |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 319 | 240 | 79 | 21 |
| 2 VB | 12 | 9 | - | 0 | - | 3 | 329 | 261 | 58 | 18 |
| 3 Tjaldur | 11 | 5 | - | 3 | - | 3 | 298 | 267 | 14 | 14 |
| 4 Neistin | 12 | 5 | - | 2 | - | 4 | 298 | 288 | 10 | 13 |
| 5 StÍF | 12 | 2 | - | 0 | - | 10 | 287 | 362 | -75 | 4 |
| 6 Kyndil | 11 | 0 | - | 0 | - | 11 | 190 | 3030 | -113 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 12 | 9 | - | 0 | - | 3 | 341 | 318 | 23 | 18 |
| 2 Neistin | 12 | 8 | - | 0 | - | 4 | 368 | 352 | 16 | 16 |
| 3 H71 | 12 | 7 | - | 0 | - | 5 | 315 | 285 | 30 | 14 |
| 4 StÍF | 12 | 5 | - | 2 | - | 5 | 293 | 291 | 2 | 12 |
| 5 Kyndil | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 293 | 320 | -27 | 8 |
| 6 KÍF | 12 | 2 | - | 0 | - | 10 | 283 | 327 | -44 | 4 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 13 | 12 | - | 1 | 38 | 16 | 22 | 13 |
| 2 Dráttur | 13 | 8 | - | 5 | 30 | 22 | 8 | 9 |
| 3 Mjølnir | 13 | 8 | - | 5 | 28 | 21 | 7 | 8 |
| 4 Fleyr | 12 | 7 | - | 5 | 25 | 19 | 6 | 7 |
| 5 ÍF | 13 | 6 | - | 7 | 24 | 24 | 0 | 6 |
| 6 KÍF | 13 | 4 | - | 9 | 22 | 31 | -9 | 5 |
| 7 TB | 12 | 0 | - | 12 | 4 | 39 | -35 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 6 | 5 | - | 1 | 17 | 5 | 12 | 5 |
| 2 SÍ | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 10 | 3 | 4 |
| 3 Fleyr | 6 | 3 | - | 3 | 10 | 11 | -1 | 3 |
| 4 Mjølnir | 6 | 0 | - | 6 | 4 | 18 | -14 | 0 |

## Odda-lið til próvtøku

**Tað tykist ikki, sum finnast tað lættir dystir í manskappingini, og tí røður fyrst og fremst um hjá ovaru liðunum ikki at snáva**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sunnudagin spæla tey trý ovaru liðini hvør í sínum lagi móti teimum trimum, sum eru á niðastu sessunum á stigatalvuni.

Tí er einki at ivast í, at VÍF, Neistin og H71 eru favorittar í sínum dystum, men fyri tað er so langt ífrá víst, at talan verður um lættar dystir hjá teimum trimum.

Kyndil misti kanska finalumøguleikan, sum liðið hevði, tá teir taptu móti H71 seinasta vikuskiftið, men seinastu umførini hevur grøna havnarliðið veruliga bitið frá sær, og tað er einki at ivast í, at ein sigur á grannunum nú stendur heilt ovarliga á ynskislistanum.

KÍF hevur eisini argað væl og virðiliga í ár. Og nú teir eisini hava vunnið tveir sigrar á rað, er eingin ivi um, at eisini teir kunnu arga hoyvíkingar.

Størsti favoritturin er kanska í Vestmanna, har eitt StÍF-lið í formkreppu skal royna at venda gongdini móti VÍF, sum veruliga hevur havt undanvind, og sum veruliga tykist hava funnið rætta spælið framaftur. Eisini hóast teir taptu móti Neistanum seinast.

Felags fyri tey trý liðini er tí, at tey ikki mugu missa nøkur “løtt” stig, og á tann hátt gera sínar møguleikar fyri einum plássi í FM-finaluni verri.